# Flyta fisk við flogfari

Kanadiumenn gera nú eina roynd at senda feskan fisk á evropeiska marknaðin við flogfari umvegis altjóða flogvøllin í Keflavík. Fiskurin kemur frá virkjum í Ný Funnalandi. Í fyrsta umfari er talan um eina roynd hjá kanadiska útflutningsfelagnum Gander og íslendska flogfelagnum Icelandair Cargo, men feløgini siga, at eydnast roynin væl, ætla tey at halda fram við flutninginum aftan á ársskiftið. Íslendskir fjølmiðlar halda tað vera undrunarvert, at kanadiumenn nú fara at flyta feskan fisk við flogfari, tí íslendski feskfiskaútflutningurin loftvegis er minkaður nógv hetta seinasta árið.




*Flogfør hjá Icelandair Cargo flyta kanadiska fiskin til Evropa (Mynd: Vísir)*

vinnu, men hann ger tað hann elskar.

### Heilavask?

Eftir at hava staðið og hoppað, geylað, rópt, dansað og annað ørt ímillum fremmandafólk í fimm tímar, má eg staðfesta, at tann samskiftishátturin Anthony Robbins brúkar virkar. Eg havi verið rúnarbundin í fimm tímar, og eisini funnið fram til hvørjar broytingar, nýggjar raðfestingar og ætlanir skulu liggja á mínum skrivaraborði næsta arbeiðsdagin. Robbins er ein úrmælingur og entertainari, hann dugur veruliga at fanga nógv fólk í sen

Robbins hevur at enda nakrar týdningarmiklar staðfestingar, sum hann biðjur fólk taka til sín:

Lívið gevur tær tað tú biður um. Tí er tað ógvuliga umráðandi at seta sær mál, og javnan at seta sær hægri mál, men grundleggjandi er neyðugt at finna eitt samvar millum raðfest virðir, mál og arbeiðshátt.

Tað ber ikki til í stuttari grein at taka alt fram, men hann leggur grundleggjandi stóran dent á positiva orku og at fáa óttan burtur. At taka ábyrgd fyri umstøðunum og ábyrgd fyri at skapa sær tað lív ein ynskir, og at alt skal gerast í einum positivum anda, tað er tað sum gevur orku. Nógv arbeiði gevur meira orku og ikki strongd, um nøgdsemi er við arbeiði, umstøður og hevur greitt mál og samsvar ímillum umstøður, mál og miðil. Mín egna meting er, at Robbins hevur nakrar týdningarmiklar hættir og einfaldar venjingar, sum kunnu brúkast. Millum ein hátt til at finna sínar egnu raðfestingar og arbeiðshættir fyri at fáa tað lívið ein strembar eftir. Mest av øllum at fokusera á tað,sum orkan skal nýtast til. Eisini haldi eg, at hansara grundleggjandi dentur á, at tann einstaki má viðurkenna, at lívið er størri enn tann einstaki er góður boðskapur í annars individualistiskum ráki. Dentur verður lagdur á, at vit mugu finna okkum til sættis við einhvørjum størri, um tað so er Guð, náttúran ella okkurt heilt triðja er ikki so týdningarmikið. Afturat hesum ber so til at keypa sær amboð, sum hoyra til vinnuleistin hjá Robbins og sum kann brúkast til at arbeiða víðari við, tí bert eitt kvøld á henda hátt hjálpir einki, um tann einstaki ikki sjálvur tekur um endan og setur sær mál og hvussu tey skulu røkkast, tú skalt finna tín innara risa.

Mest av øllum, er hann eitt stórt upplivilsi á einum palli, sjálvt um eg til tíðir kendi meg sum part av einari svakari, nýggjari business sekt. Afturat tí hevur hann stuðulin, tí at hann hevur hjálpt nógvum kendum sjónleikarum, ítróttarfólki og polikkarum.






# Stór íverksetaravika í Danmark

**Í gjár byrjaði stórsta landsumfatandi verkætlanin fyri íverksetarar í Danmark**

*www.business-line.fo*

Danmark hevur í fleiri ár útmerkað seg sum eitt sera gott íverksetaraland. Málsetningurin er, at í 2010 skal Danmark verða tað landið, har flestar nýggjar fyritøkur síggja dagsins ljós og í 2015 skal Danmark verða tað landið, har flestu vakstrarfyritøkur verða at finna.

### Eitt gott íverksetaraland

Danmark er millum tey bestu londini í heiminum, tá tað ræður um at skapa góð korð til íverksetarar. Hóast hetta, er Danmark ikki tað landið, har flestu vakstrarfyritøkur eru at finna. Tí er endamálið at skapa enn betri treytir til øll tey mongu, ið droyma um at stovna egið virki, ella síggja sínar fyritøkur vaksa.

### Íverksetarar stóran týdning

- Tað eru fleiri orsøkir til, at íverkstan er týdningarmikil fyri Danmark. Tað hevur stóran týdning fyri hin einstaka at kunna gera sín dreym til verðuleika

- Íverksetan hevur eisini stóran týdning fyri samfelagsbúskapin og drívmegina í samfelagnum. Her verður serliga hugsað um tær sokallaðu vakstrarfyritøkurnar, ella gazellurnar, sum skapa nýggj arbeiðspláss og stóran umsetning, sigur stjórin í danska vinnumálaráðnum, Finn Lauritzen,

### 70 ymisk tiltøk

Skipað verður fyri 70 ymsum tiltøkum, ið fara fram kring alt landið. Tú kanst t.d. fáa tær eitt prát við ein, ið hevur fingið eina sera góða byrjan, finna íblástur til nýggj hugskot, tosa við ein ráðgeva, fara til ein fyrilestur, ið passar til tíni áhugamál, osv..

Tað eru tey 5 lokalu "vakstrarhúsini" kring landið, ið standa fyri tiltøkunum, ið sum sagt verða fyriskipað hesa vikuna.